## Mentanarvika í Runavík

Árliga Mentanarvikan í Runavíkar kommunu verður nú aftur á skránni. Vikan byrjar sunnudagin 28. oktober og endar sunnudagin 4. november. Býurin bjóðar listaframsýningar, tónleikatiltøk, føroyskan dans, barnatiltøk, fyrilestrar, gongutúrar, ítrótt og mangt annað. Undirhald og mentan fyri øll. Í somu viku verður aljóða vinnustevnan, ið hevur heitið Faroexpo 2007, hildin í Runavík. Tað er fyritøkan Virkisráðgeving í Saltangará, sum samskipar vinnustevnuna. Faroexpo verður hildin í døgunum 29. oktober til 4. november 2007. Talan er um eina undirhaldandi og spennandi viku hjá bæði almenninginum og hjá teimum fyritøkum, ið luttaka á vinnustevnuni. Ein rættur blandingur av mentanarligum undirhaldi og fakligum innihaldi.



## Ónøgdir grønlendigar

Í Grønlandi eru fiski- og veiðimannafelagið KNAPK og arbeiðsgevarafelagið GA misnøgd við, at landsstýrið fer at leggja eitt uppskot um nýggja fiskivinnulóggávu fyri Landstingið uttan at spyrja feløgini fyrst. Hans Enoksen, landsstýrisformaður, segði leygardagin, at vinnan sleppur at siga sína hugsan, eftir at uppskotið er lagt fram. Tað eru vinnufeløgini ikki nøgd við. Eftir teirra tykki eiga tey at siga sína hugsan, áðrenn málið kemur á tingborð.

# Raðfesta skúlan ovarliga

**Bygdaráðið í Sunda kommunu hevur gjørt av at raðfesta undirvísingina í barnaskúlanum sera ovarliga, og í hesum sambandi fáa allir lærarar við barnaskúlarnar í kommununi eina teldu frá kommununi**

ÚTBÚGVING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Í Sunda kommunu ganga tey høgt upp í undirvísingina og skúlagongdina í fólkaskúlanum. Og bygdaráðið ynskir at skapa teir bestu karmarnar fyri skúlan.

Vit hava trý tey seinastu árini sett 250.000 krónur av til telduútbúna til teir seks barnaskúlarnar í kommununi, og komandi ár verða 300.000 krónur settar av til endamálið. Og tá hava vit útvegað øllum børnum í okkara barnaskúlum teldur, eins og lærararnir eisini fáa hvør sína, sigur Heðin Zachariasen, borgarstjóri.

Ynski er at skapa fortreytir við barnaskúlarnar í kommununi soleiðis, at lærarar veruliga merkja, at økið verður høgt raðfest.

Hetta fer vónandi at síggjast aftur í áhuganum at søkja um starv í okkara barnaskúlum, sigur Heðin Zachariasen.

### Góðar karmar

Kommunan setur harumframt eisini av 4.700 krónur til hvønn næming í størru skúlunum og 7.000 krónur til næmingarnar í Tjørnuvík og við Gjógv.

Hetta eru pengar, sum skúlaleiðarin hevur ræði á og frítt kann nýta sum viðkomandi finnur fyri best, sjálvandi innanfyri teir karmar, sum settir verða, ítøkiliga at hetta skal hava samband við undirvísingina. Vit meta, at hetta er ein góð skipan, sum gevur lærarunum størri ábyrgd og økir um áhugan hjá teimum fyri starvinum, sigur Heðin Zachariasen.

Borgarstjórin sigur, at ábyrgdarbýtið er tvídeilt millum land og kommunur, og at tað altíð er óheppi, men hann sigur samstundis, at teir altíð vilja finnast í fremstu røð, eisini tá tað kemur til fysisku karmarnar um undirvísingina. Soleiðis er kommunan í løtuni í holt við at byggja ein nýggjan skúla í Hósvík, sum skal standa klárur til skúlabyrjan skúlaárið 2008-09.

Í kommununi eru seks barnaskúlan, teir eru í Tjørnuvík, á Oyrabakka, í Hósvík, Haldórsvík, Hvalvík og við Gjógv.



*Heðin Zachariassen, borgarstjóri í Sunda kommunu, situr á tingi fyri Fólkaflokkin*

# Saman standa vit sterkari

**Føroya Postfelag og Starvsmannafelagið hava í eina tíð havt samráðingar um eina samalegging av feløgunum**

FAKFELAG
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Føroya Postfelag verður væntandi skjótt ein partur av Starvsmannafelagnum. Nakrir samráðingarfundir hava verið partanna millum, og leygardagin hevði Føroya Postfelag so boðað til fundar, har støða skuldi takast til samráðingarúrslitið og somuleiðis eisini um, hvørt limirnir vildu leggja saman við starvsmannafelagnum.

Forkvinnan í Føroya Postfelag, Heidi Biskopstø sigur við Portalin, at lógirnar hjá Postfelagnum siga, at tveir triðingar av limunum skulu vera møttir fyri at kunna taka eina slíka avgerð, men í morgun vantaðu fimtan limir í at uppfylla hetta kravið. Tískil verður nýggjur fundur at avgerða framtíðina hjá felagnum.

Heidi Biskopstø sigur, at tað sjálvandi er ilt at gita um, hvussu stemningurin er millum limirnar, men hon helt seg tó merkja, at fleiri vóru fyri einari samanlegging.

- Tað kemur sum ein avleiðing av, at Postverk Føroya hevur limað seg inn í Føroya Arbeiðsgevarafelag, og vit meta, at vit koma at standa sterkari í einum stórum fakfelag. So tað er fremsta orsøkin til, at vit hava valt hesa loysnina, sigur Heidi Biskopstø.

Sambært lógunum hjá Postfelagnum skal nýggjur fundur haldast innan 14 dagar, tó við átta daga boðanarfreist.



*Fundur skal haldast innan fjúrtan dagar við átta daga fráboðanarfreist, sigur Heidi Biskopstø*

## Alivinnan í menning

**Alivinnan útflutti fyri 126 milliónir meiri fyrstu sjey mánaðirnar í ár í mun til sama tíðarskeið í fjør**

ALIVINNA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Alivinnan er við at menna seg aftur. Tað sæst ikki minst í hagtølunum fyri útflutning, har alivinnan í fjør flutti út fyri eitt virði upp á 169 milliónir krónur fyrstu sjey mánaðirnar. Í ár er virðið fyri somu mánaðir økt upp í 295 milíónir krónur.

Fyribilstøl fyri útflutningsvirðið fyrstu 7 mánaðirnar í ár er áleið tað sama sum tað var somu 7 mánaðirnar í 2006. Samlaði útflutningurin var góðar 2,1 mia.kr. bæði í 2007 og í 2006. Av fiskaútflutninginum er tað serliga alifiskur, saman við uppsjóvarfiski og bólkinum øðrum fiski og fiskaúrdráttum, sum halda útflutningsvirðinum uppi. Men avgerandi munin ger bólkurin skip, sum er heilar 52 mió. kr. størri í ár í mun til í fjør. Hinvegin er útflutningsvirðið av botnfiski (m.a. toski, hýsu, upsa) minkað við 12%, og flundrufiski (m.a. kalva, svartkalva) er minkað við 4%. Útflutningsvirðið av skeljafiski er minkað við 42% og aðrar vørur eru minkaðar við 59%